TWR- KVINNUR VIÐ VÓN

BØNARÁHEITANIR FYRI OKTOBER 2026

At lyfta kvinnur upp, sum líða undir harðskapi og misnýtslu

1. Harri, broyt hugburðin hjá ungdómunum í **Nigeria**, sum fremja halgisiða (rituel) dráp og svikagerðir fyri at vinna skjótan pening. Lat tey læra at virða lívið fram um órættvíst vunnið ríkidømi. (*Job* 33:4)?
2. Faðir, veit kvinnum, sum liva í ótta fyri harðskapi í **Norður Kýpros,** vón og skjól. Lat myndugleikarnar og samfeløgini útinna rættvísi og samkenslu fyri at steðga harðskapi av øllum slagi. (*Sálmur* 46:2-3, ensk:46:1-2)
3. Lat tilbiðjan og bønirnar hjá samkomum og kirkjum, sum arbeiða í loyndum í N**orðurkorea** umbroyta tjóðina. Harri, varðveit hesi trúføstu, tí um tey verða avdúkað, merkir tað deyða ella fangalegu. (*Sálmur* 17:8)
4. Menn, kvinnur og børn á **Papua Ný Guinea** fáa varandi mein, tá tað snýr seg um **virksaman** menniskjahandil. Gud, varðveit tey, sum líða undir hesum, og veit teimum verju, frælsi, rætta viðferð og nýggja lívsgóðsku. (*Esaias* 1:17)
5. Gud, ger enda á ringrásina av misnýtslu, svikagerð og tøgn, sum hevur valdað í familjum í fleiri ættarlið **í Portugal**. Lat kirkjur og samkomur reisa seg at verja tey viðbreknu og geva teimum særdu virðiliga endurreisn. (*Sálmur* 147:3)
6. Harri, hvønn tíma eru 14 kvinnur í **Rumenia** fyri ágangi. Ger ein enda á hesum harðskapi, verj tær, sum eru í vanda, grøð offrini og umbroyt hjørtuni á teimum, ið fremja ágang. (*Sálmur* 12)
7. Harri, veit teimum í **Russlandi,** sum fáa staðfest HIV, troyst, frið og stuðul. Lat tey fáa dirvi at liva, vitandi at Tú fylgist við teimum hvønn dag. (*Jóhannes* 16:33)
8. Faðir, lat talið av kvinnuhúsum og -skýlum økjast og fleiri starvsfólk vera til at arbeiða millum misnýttar kvinnur í **Suðurafrika**, sum líða undir harðskapi orsakað av kyni. Reis upp trúgvandi, sum kunnu elska og verja tey óseku og viðbreknu. (*Sálmur* 140: 2-5; ensk:140: 1-4)
9. Verj gentur í **Timor Leste** frá tvingsilsgiftarmálum**,** Harri. Veit familjum hjartalag til at virða rættindi hjá døtrum til útbúgving og frælsi at velja sjálvar. (*Sálmur* 82:3-4)
10. Lat offur fyri innanhýsis harðskapi í **Uruguai** finna verju og útveg at rýma undan ógvusliga hóttandi umstøðum. Útvega trygg hjálparnetverk og samkennandi hjartalag til at hjálpa teimum. (*Orðtøkini* 24:11-12)
11. Lat kropsligan harðskap, kenslulig mein, tvingsil og allan harðskap móti kvinnum í **Vjetnam** fáa ein enda, og lat tær, sum eru komnar undan við lívinum, finna tryggleika, grøðing og rættvísi. (*Sálmur* 29:11)
12. Faðir, steðgað teimum vaksnu í **Belarus,** sum gera seg kynsliga inn á børn. Ger at tey angra og venda við til Gud og verða umbroytt. (*Ezekiel* 18:30-31)
13. Harri, brót ringrásina av misnýtslu, tøgn og skomm í **Bonaire**: skomm, sum hevur røtur í umdøminum hjá familjum við fátækradømi, skøkjulevnaði ella brotsverkum, og tøgn, sum er íkomin av at líða einsamøll. (*Jóhannes* 8:36)
14. Harri, útvega kvinnum og børnum í **Botsvana**, sum flýggja undan harðskapi orsakað av kyni, skýli, sum kunnu veita teimum verju, heilsubót og tryggleika. (*Sálmur* 72:12-14)
15. Harri, grøð hjørtuni á kvinnum í **Kambodja**, sum eru fylt av kensluligari líðing orsakað av innanhýsis harðskapi í familjuni. (*Jóhannes* 14:27)

16. Gud, bjarga kvinnum, sum eru fangaðar í sølu av brúðrum, sum fer fram um landamørk orsakað av eitt-barns politikkinum í **Kina**. Lat brotsmenninar fáa rættvísan dóm, og gev offrunum heilsubót. (*Esaias* 61:1)
17. Harri, verj børn í **Danmark** móti kynsligari misnýtslu og blóðskemd. Gev offrunum mót at siga frá, og verj tey frá nakrantíð aftur at koma í samband við sínar mísnýtarar. (*Markus* 9:36-37)
18. Faðir, grød tey sum eru offur fyri innanhýsis harðskapi í **Dominikalýðveldinum**. Gev teimum mót at søkja sær hjálp og umsorgan frá fólki í nærumhvørvinum. (*Sálmur* 23:4)
19. Harri, vit biðja í Jesu navni, at ein endi má fáast á harðskapi orsakað av kyni og á kvinnudrápi í **Eysturkappa í Suðurafrika.** (*1. Pætursbræv* 3:7)
20. Faðir, reis upp trúartænastur í **Eswatini** sum kunnu taka sær av teimum kvinnum, sum bera sálarløstir orsakað av misnýtslu, avvísing og sorg. Grød hjørtu teirra við Tíni umsorgan. (*Sálmur* 34:19; ensk: 34:18)
21. Faðir, verj kvinnur og gentur í **Týsklandi** frá øktum harðskapi. Lat hvørt offur taka mót til sín at søkja sær hjálp, og lat leiðarar seta avgerandi tiltøk í verk. (*Sálmur* 91:1-4)
22. Harri, verj gentur í **Indonesia,** sum eru í vanda fyri at fáa kynsliga skamfýling av kvinnuligari umskering. Gev foreldrum og leiðarum í samfeløgum vísdóm og mót at gera enda á hesari skaðiligu siðvenju med alla. (*Orðtøkini* 31:8)
23. Í **Japan** eru nøkur, sum ikki eru japanar mangan útsett fyri ómenniskjaligt tvingsilsarbeiði, og børn teirra ofta útsett fyri kynsmisnýtslu. Gud, brót niður hesa óndu skipan og bjarga hesum offrum. (*Mika* 6:8)
24. Faðir, gev líðandi kvinnum í **Mongolia** tol og vísdóm, har familjusambondini eru kølnað orsakað av rúsdrekkamisnýtslu hjá monnum teirra. (*1.Pætursbræv* 5:7)
25. Lat kvinnur í **Mýanmar** sleppa undan harðskapi, mannamuni og ótta. Harri, veit teimum rættvísi og virðing, og styrk tær við útbúgving, tryggleika og møguleikum. (*Orðtøkini* 3:23-26)
26. Faðir, lat rættvísi Tína fløða sum ein á í **Liberia.** Lat fjalda misnýtslu koma fram í ljósið, og lat ein og hvønn misnýtara, sum noktar at venda við**,** fáa rættvísan dóm. (*Amos* 5:24)
27. Gud, vit biðja um frið í **Nigeria**. Lat allan harðskap, yvirgang, gíslatøku ella blóðúthelling fáa ein enda við Tínum almátti. (*Sálmur* 46:10; ensk: 46:9)
28. Harri, lat kvinnur í **Norður Kýpros,** sum líða undir misnýtslu ella harðskapi innanhýsis ella á arbeiðsplássum, fáa dirvi at siga frá og fáa verju, stuðul og grøðing. (*Sálmur* 9:10-11; ensk: 9:9-10)
29. Faðir, grød djúpu sálarløstirn**a**r sum standast av orsakað av ótta, harðskapi og hungri, sum fólkið í **Norðurkorea** hevur borið, síðan tey vóru fødd. Umskapa teirra mentan, og lat tey fáa samkenslu og hjartalag hvør fyri øðrum. (*Ezekiel* 36:26)
30. Harri, lat sálarliga innanhýsis harðskapin **í Kina** koma fram í ljósið, og reis upp kirkjur, samkomur og skýli, har tey kunnu leita til og fáa verju og grøðing og rætta viðferð, har sannleikin kemur fram. (*Esaias* 54:14)
31. Harri og Gud, grød og lívga kvinnur í **Libanon**, sum merkja harðskap, órættvísi, kúgan og skaðiligan felagsskap. Lat tær finna álítandi stuðulsskipan. (*Sálmur* 34:17-19; ensk: 34:16-18)

”Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar, so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!” ***Hebrearabrævið 4:16***

Eeva Vähäsarja: *"Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn"*

At grípa vónina - Oktober 2026

Tá ið heimurin særir, dregur Gud nærri at Sær

eftir Susie Peck, altjóða tænastuleiðara hjá TWR Kvinnur við Vón

**"Hann skal turka hvørt tár av eygum teirra; deyðin skal ikki vera longur,
og hvørki sorg, skríggj ella pína skal vera longur – tí hitt fyrra er farið. "** ***Opinberingin 21:4***

Í oktober mánaði venda vit hjørtum okkara til ein av mest pínufullu og átrokandi veruleikunum í heiminum í dag: harðskapur móti kvinnum. Ikki er tað eitt lætt evni, men vit mugu tosa um tað. Eg trúgvi, at tá ið vit biðja, koma vit inn í eitt heilagt øki: vit standa í skarðinum til frama fyri kvinnur, sum hava fingið røddina tepta, og likamið meiðslað, og sár á hjartað**,** sum heimurin ikki sær**.**

Tølini í sær sjálvum fáa ein at vakna við. Sambært Alheimsheilsustovninum (World Health Organization) hava 30% av kvinnum – tað er nærum ein av trimum kvinnum í øllum heiminum – fingið kropsligan ella kynsligan harðskap at kenna onkuntíð í lívinum. Summar í sínum egna heimi. Og tað steðgar ikki har. Menniskjahandil heldur fram at oyðileggja samfeløg nógvastaðni í heiminum. Kvinnur og gentur umboða 71% av øllum trælaoffrum nú á døgum, og tað merkir, at umleið 35 milliónir av kvinnum og gentum júst nú verða útnyttaðar á onkran hátt. Tær flestu av offrunum, sum eru gentur, verða seldar til kynsliga útnyttan.

Hetta er ikki bert hagtøl. Aftan fyri hvørt tal er eitt andlit, eitt navn, ein søga – ein dóttir, ein mamma, ein systir. Og hvør einstøk teirra hevur stóran týdning fyri Gud. Hann skapti menn og kvinnur í Síni mynd og Sínum líkleika og setti tey í ein fulkomnan heim, har eingin harðskapur var. Men synd kom inn í heimin, og alt broyttist. Hjartans tráan hjá menniskjunum varð avskeplað, og til henda dag hevur syndin sett síni merki. Syndin oyðileggur, men Gud endurnýggjar.

Táið vit biðja – latið okkum ikki víkja frá hesum sannleika: Gud hevur umsorgan fyri kvinnum! Longu í fyrndargomlu lógunum í Gamla Testamenti, langt áðrenn heimurin tosaði um mannarættindi ella virðing, hevði Gud lógarfest til frama fyri kvinnur: at verja tær, æra tær, og forbjóðaði, at tær skuldu verða viðfarnar sum ein handilsvøra. Hjarta Hansara er ikki broytt.

Sum Kristi eftirfylgjarar eru vit kallað at fremja rættvísi fyri tey, sum eru kúgað og illa viðfarin. Bíblian tosar áhaldandi um, at Gud ynskir rættvísi og rættlæti, og Hann bønar okkum at verja tey viðbreknu. "Latið hin arma og faðirleysa fáa rætt," sigur Sálmur 82:3-4, "dømið hin neyðstadda og fátæka frían! Bjargið hinum arma og fátæka, frelsið hann úr hond hinna gudleysu!"

Harðskapur, annaðhvørt kropsligur ella sálarligur, munnligur ella kynsligur, er ongantíð skaptur av Gudi. Hvør einasta ónd gerð móti kvinnum særir hjarta Faðirsins**.** Hann sær tað, sum heimurin ikki gevur sær far um. Hann hoyrir rópini, sum eru ósøgd. Hann vitjar tey, sum líða í tøgn.

Tað er júst tí, at bønir okkara hava týdning. Tá ið vit biðja fyri kvinnum, sum eru innibyrgdar í heimum við harðskapi, og fyri gentum, sum verða útnyttaðar og seldar í gjøgnum menniskjahandil, og fyri kvinnum, sum hava ósjónlig arr í sálini orsakað av misnýtslu, so siga vit: ***"Hon hevur týdning. Lív hennara hevur týdning. Heilsubót hennara hevur týdning."***

Tá ið vit so, biðja hendan mánaðin, latið okkum gera tað báði við sorg og vón. Sorg, tí hendan líðing er verulig og pínufull. Og vón, tí vit tæna einum Gudi, sum er almáttugur og mentur at frelsa, grøða og endurskapa. Tá ið Jesus fór undir tænastu Sína her á jørð, las Hann hetta brotið hjá *Esaiasi* :

“**Andi Harrans HARRANS er yvir mær, av tí at Harrin hevur salvað meg at bera eyðmjúkum gleðiboð; Hann hevur sent Meg við grøðing til teirra, ið hava sundurbrotið hjarta, at boða fangum frælsi og bundnum, at tey skulu sleppa leys.”** (Esaias 61:1)

Gud sær hvørja einstaka kvinnu – enntá tær, sum heimurin hevur gloymt, og Hann elskar tær ómetaliga høgt.

Takk fyri tykkara hjartans samhuga og tykkara trúføstu bønir.

twr WOMEN OF HOPE

KVINNUR VIÐ VÓN
twrwomenofhope.org

Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva

<u>Fíggjarstuðul:</u>

EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145

til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio).

Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR.

TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org